Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	28. mars 2023
Mál nr.:	23/01048
Málsviðgjørt:	JPP/RNA
Ummælistíð:	8. mars til 19. mars 2023
Eftirkannað:	20.03.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu
(Broytingar í tøkugjaldinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018 og § 39 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2.** Fyritøkur og einstaklingar, sum eru fevnd av § 1, skulu í sambandi við tøku av alifiski rinda avgjald til landskassan.
Stk. 2. Avgjaldsgrundarlagið er grundað á mánaðarligu tøkuna av alifiski í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum í sama mánaði.
Stk. 3. Við átekning í fíggjarlógini til inntøkujáttanina í fíggjarárinum verður ásett, hvør altjóða marknaðarprísur verður nýttur.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð tey roknskapartøl, sum alifyritøkurnar skulu lata inn, so miðal framleiðslukostnaðurin fyri hvørt hálvár kann gerast upp.
Stk. 5. Við støði í skjali 1 almannakunnger landsstýrismaðurin hvørt hálvár, hvør miðal framleiðslukostnaðurin er."

2. Aftan á § 2, men áðrenn yvirskriftina yvir § 4, verður sett:

"**§ 2 a.** Gjaldið eftir § 2 verður ásett sum ásett í skjali 2.
Stk. 2. Gjald verður ikki rindað av tøku, ið landsdjóralæknin hevur álagt alara at fremja, og sum ikki kann seljast til marknaðarvirði.
Stk. 3. Upplýsingar um mánaðarligu tøkuna av alifiski skulu innan 15. í

mánaðinum aftan á tøkuna latast TAKS. Um upplýsingarnar ikki verða latnar TAKS innan ásettu freistina, verður sekt upp á kr. 1.000 løgd afturat tøkugjaldinum fyri avvarðandi mánað.
Stk. 4. Tøkugjaldið fellur til gjaldingar í fýra gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Verður gjaldið ikki goldið rættstundis, verður renta roknað við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum.

§ 2 b. 2% av tøkugjaldinum fellur til kommunurnar.

Stk. 2. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkan verður býtt millum kommunurnar og um útgjald."

3. Skjølini 1 og 2, sbr. skjal 1, verða sett sum skjøl í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu.

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2023, sbr. tó stk. 2.
Stk. 2. Í § 1, nr. 2 verður § 2 b sett í gildi 1. januar 2024.

Skjal 1

“Skjal 1

Hátturin, ið verður nýttur til at finna miðal framleiðslukostnaðin

Framleiðslukostnaður =
+ Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar
+ Goymslubroytingar
+ aðrir uttanhýsis kostnaðir
+ starvsfólkakostnaðir
+ av- og niðurskrivingarkostnaðir
÷ tøkugjaldið til landskassan.

Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar: Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar eru sum oftast uppgivnir í rakstrarroknskapinum sum ein serstakur postur. Tó upplýsa summar fyritøkur einans aðrar uttanhýsis kostnaðir í einum bruttoposti, har kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar eru innroknaðir. Í slíkum føri eru tað einans aðrir uttanhýsis kostnaðir, sum verða nýttir í útrokningini.

Goymslubroytingar: Her er talan um goymslubroytingar av lidnum vørum og vørum í gerð. Virðið á goymslubroytingunum er tað í rakstrarroknskapinum uppgivna virðið.

Aðrir uttanhýsis kostnaðir: Aðrir uttanhýsis kostnaðir eru uppgivnir í rakstrarroknskapinum. Summar fyritøkur uppgeva aðrar uttanhýsis kostnaðir í einum bruttoposti, sum eisini umfata kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar. Aðrar fyritøkur skilja ímillum aðrar uttanhýsis kostnaðir og kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar. Fyri útrokningina er tað umráðandi, at bæði aðrir uttanhýsis kostnaðir og kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar verða tiknir við.

Starvsfólkakostnaðir: Starvsfólkakostnaðir eru teir, ið eru uppgivnir í rakstrarroknskapinum.

Av- og niðurskrivingar: Tað eru av- og niðurskrivingarnar í rakstrarroknskapinum, sum skulu nýtast.

Tøkugjaldið til landskassan: Hjá alifyritøkunum er tøkugjaldið ein kostnaður, sum verður skrásettur í rakstrarroknskapinum, undir *Aðrir uttanhýsis kostnaðir*. Miðal framleiðslukostnaðin verður nýttur sum grundarlag í sambandi við uppgerð av tøkugjaldinum og tískil er tøkugjaldið í hesum høpi ikki at meta sum ein framleiðslukostnaður og verður tí trekt frá í útrokningini.

Miðal framleiðslukostnaðurin fyri kilo er samlaði framleiðslukostnaðurin/tøkan í kruvdari vekt.

Hetta roknistykkið verður gjørt fyri alipartin hjá alifyritøkunum í Føroyum. Uppgerðin verður gjørd við støði í roknskapunum hjá føroysku alifyritøkunum.

Skjal 2

Tøkugjaldsstigin, ið vísir, hvussu gjaldið er treytað av marknaðarprísinum

Gjaldið verður ásett soleiðis:

P = miðal altjóða marknaðarprísur í DKK pr. kg.

K = miðal framleiðslukostnaður í DKK pr. kg.

- Er P minni enn K, er gjaldið 0,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K, men minni enn K pluss 5 kr., er gjaldið 2,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men minni enn K pluss 15 kr., er gjaldið 5,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr., men minni enn K pluss 20 kr., er gjaldið 7,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 20 kr., men minni enn K pluss 25 kr., er gjaldið 10,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 25 kr., men minni enn K pluss 30 kr., er gjaldið 12,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 30 kr., men minni enn K pluss 35 kr., er gjaldið 15,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 35 kr., men minni enn K pluss 40 kr., er gjaldið 17,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 40 kr., er gjaldið 20,0%.

Talva 1

Prísur	**Gjald**
P<K	0,5%
K ≤ P < K+5	2,5%
K+5 ≤ P < K+15	5,0%
K+15 ≤ P < K+20	7,5%
K+20 ≤ P < K+25	10,0%
K+25 ≤ P < K+30	12,5%
K+30 ≤ P < K+35	15,0%
K+35 ≤ P < K+40	17,5%
P≥K+40	20,0%

”

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Tað er uppgáva landsstýrisins javnan at meta um landsins avgjalds- og skattaskipanir og í hvønn mun tað er neyðugt at tillaga hesar, til tess at fíggja føroyska vælferðarsamfelagið. Í hesum høpi er landsstýrið samt um at tillaga lógina um loyvisgjald á alivinnuna.

Landsstýrið metir tað verða rímiligt, at alivinnan rindar fyri tann framíhjárætt, sum feløgini hava til at gagnnýta føroysku alifirðirnar. Landsstýrið metir harumframt, at alifyritøkurnar eiga at gjalda lutfalsiga meira, tá laksaprísirnir eru høgir. Tískil er neyðugt at tillaga lógina um loyvisgjald á alivinnuna.

Framleiðslukostnaðurin í alivinnuni er hækkaður munandi seinnu árini. Tí uppstanda støður, har alifyritøkur rinda meira enn 0,5% í loyvisgjaldi, hóast laksaprísurin á heimsmarknaðinum er lægri enn framleiðslukostnaðurin. Samstundis rinda alifyritøkurnar í minna lagi, tá ið laksaprísurin á heimsmarknaðinum er serliga høgur. Hesi viðurskifti tala eisini fyri, at lógin verður dagførd.

Føroyska alivinnan er vorðin ein sera týðandi partur av føroyska búskapinum. Útflutningurin av laksi er nú vorðin ein lítil helmingur av samlaða vøruútflutninginum.

Virði av útfluttum laksi sum partur av samlaða vøruútflutninginum

Í mió. kr.	2017	2018	2019	2020	2021
Útfluttur laksur	3.867.656	3.340.535	4.041.516	3.312.382	4.489.457
Vøruútflutningur tilsamans	8.776.625	8.023.338	9.533.598	8.400.794	10.061.692
Laksaútflutningurin í prosentum	44,1%	41,6%	42,4%	39,4%	44,6%

Kelda: Hagstova Føroya

Alifyritøkurnar hava gjørt stórar íløgur seinastu árini, og útlit eru tí fyri, at virðið á laksaútflutninginum økist uppaftur meira komandi árini. Eftir ætlan fer alivinnan at gera stórar íløgur næstu árini.

Tá landið ger av at hækka loyvisgjaldið á alivinnuna, er neyðugt at gera tað á ein skynsaman hátt, soleiðis at alivinnan eisini framhaldandi verður ein av høvuðssúlunum undir føroyska búskapinum. Gjaldið skal síggjast sum eitt gjald á tann serstaka vinningin, sum vinnulig serrættindi hava við sær. Hóast talan kann verða um eina munandi hækking av gjaldinum, metir landsstýrið kortini, at betri parturin av tilfeingisvirðinum framhaldandi verður hjá alifyritøkunum. Landsstýrið metir, at hóast gjaldið hækkar, so megnar vinnan framvegis at gera íløgur, sum eru neyðugar fyri at tryggja áhaldandi vøkstur.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóg á økinum er løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018 og løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

Stutt um lógina
Í galdandi lóg er grundarlagið fyri tøkugjaldinum mánaðarliga tøkan av alifiski í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum í sama mánaði. Gjaldið verður ásett sum ávíst prosent av gjaldsgrundarlagnum.

Tað er umráðandi at hava fyri eyga, at loyvisgjaldið á alivinnuna er ikki at meta sum ein skattur, men heldur sum eitt nýtslugjald, sum landsmyndugleikarnir áleggja fyri rættin at gagnnýta føroysku aliøkini.

Meginreglan í tøkugjaldsskipanini er, at jú hægri alifiskaprísurin er, tess hægri er gjaldið:

- Er prísurin 36. kr. kilo ella hægri, er gjaldið 5%.
- Er prísurin millum 32 kr. og 36. kr. kilo, er gjaldið 2,5%.
- Er prísurin lægri enn 32 kr. kilo, er gjaldið 0,5%.

Við átekning í løgtingsfíggjarlógini fyri fíggjarárið 2023 er ásett, at mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært "Fish Pool Index" verður brúktur sum altjóða marknaðarprísur til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum undir loyvisgjaldinum.

Umroknað verður til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank.

Umframt loyvisgjaldið á alivinnu rinda fyritøkur í alivinnuni eisini vanligan partafelagsskatt og kapitalvinningsskatt á sama hátt, sum aðrar fyritøkur. Eigarar av alifyritøkum rinda skatt av vinningsbýti, tá ið fyritøkurnar rinda út vinningsbýti til eigararnar.

Sambært § 33, nr. 18 í skattalógini kunnu alifyritøkur draga loyvisgjaldið frá skattskyldugu inntøkuni.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Uppskotið hevur til endamáls at tillaga lógina um loyvisgjald, soleiðis at alifyritøkurnar skulu gjalda lutfalsliga meira, tá laksaprísurin er høgur. Meginreglan er framvegis, at jú hægri alifiskaprísurin er, tess hægri er gjaldið. Ásett verður eisini, at miðal framleiðslukostnaðurin skal útroknast hálvárliga. Frameftir verður minstagjaldið á 0,5% einans goldið, tá miðal altjóða marknaðarprisurin er lægri enn framleiðslukostnaðurin. Er prísurin hægri enn framleiðslukostnaðurin, byrjar skipanin við stigvísum hækkingum.

Nógv atlit eru, tá avgerð skal takast um, hvussu nógv alifyritøkurnar skulu rinda í tøkugjaldi.

Í frágreiðing frá landsstýrisins skattanevnd, latin landsstýrinum 1. desember 2017, varð mett, at ein vansi við verandi loyvisgjaldi er, at landið fær lutfalsliga lítlan part av inntøkunum sammett við vinningin í alivinnuni, tá ið altjóða laksaprísir eru høgir. Mælt varð til at broyta loyvisgjaldið á alivinnu soleiðis, at landið fær inn størri part av inntøkunum sammett við í dag – serliga tá ið altjóða laksaprísir eru høgir.

Skattanevndin mælti til, at loyvisgjaldið varð broytt til eitt gjald á tilfeingisrentuna. Gjaldið á tilfeingisrentuna skuldi grundast á mettu tilfeingisrentuna. Mett tilfeingisrenta er staðfesta avkastið (vinningurin), sum er eftir, tá ið framleiðslukostnaður og mettur vanligur vinningur

eru drignir frá staðfesta umsetninginum. Gjaldið á mettu tilfeingisrentuna skuldi eftir uppskotinum hjá skattanevndini verða 80 prosent av mettu tilfeingisrentuni.

Hóast tilmælini frá skattanevndini í 2017 vóru greið, so verður mett, at tað ikki er skynsamt at fara so ógvusliga til verka, sum skattanevndin skjýtur upp. Skilabetri er, at skipanin verður tillagað soleiðis, at føroysku alifyritøkurnar við rímiligari vissu kunnu leggja til rættis virksemið frameftir, uttan alt ov stórar stoytir av øktum gjøldum. Tað verður altíð ein politiskur spurningur um, hvussu nógv alifyritøkurnar skulu gjalda fyri rættin at gagnnýta føroysku aliøkini, og tí eigur skipanin javnan at verða eftirmett.

Harumframt verður mett, at bæði fyri alivinnu og fyri umsitingina av skipanini er eitt nýtslugjald/royalty ein einfaldari skipan enn eitt gjald á tilfeingisrentuna, sum er ein tung skipan at umsita.

Skotið verður tí upp, at verandi skipan við tøkugjaldi heldur verður endurskoðað og tillagað.

Eftir áheitan frá TAKS verður eisini skotið upp at gera eina tekniska broyting í § 2, stk. 7.

Í § 2, stk. 7 í løgtingslógini um loyvisgjald á alivinnu er ásett, at tøkugjaldið fellur til gjaldingar í fýra gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. oktober við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Skotið verður upp, at fjórða árliga gjaldið skal fella til gjaldingar 1. november heldur enn 1. oktober.

Longu tá lógin varð samtykt á fyrsta sinni, var ætlanin, at gjaldingin av tøkugjaldinum skuldi gerast pr. ársfjórðing eins og við meirvirðisgjaldinum, t.e. at fjórða gjaldið skuldi falla til gjaldingar 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum.

TAKS og alivinnan virka longu sum var lógin broytt, og tískil hevur henda tekniska broytingin hvørki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri partarnar.

Í § 1, nr. 2 eru smávegis broytingar gjørdar fyri greidleikans skyld. § 2 í galdandi løgtingslóg er býtt sundur í tvey, soleiðis at galdandi § 2, stk. 1-3 verða nýggj § 2; § 2, stk. 4-7 verður ein nýggj § 2 a og § 2, stk. 8 í galdandi løgtingslóg verður strikað.

Heldur enn at hava tøkugjaldsstigan inni í sjálvari greinini, sum í verandi løgtingslóg, verður skotið upp, at tøkugjaldið verður ásett sum ásett í skjali 2.

Skotið verður upp, at § 2, stk. 5 í verandi løgtingslóg, verður broytt til § 2 a, stk. 2.

§ 2, stk. 6 í verandi løgtingslóg verður broytt til § 2 a, stk. 3. Innihaldsliga er ásetingin óbroytt, tó at orðingin "*...Um upplýsingarnar um tøku ikki verða latnar TAKS innan ásettu freistina...*" verður broytt til: "*...Um upplýsingarnar ikki verða latnar TAKS innan ásettu freistina...*".
§ 2, stk. 7 í verandi løgtingslóg verður broytt til § 2 a, stk. 4. Talan er um eina tekniska broyting, har "1. oktober" verður broytt til "1. november". Eisini er orðingin "*við gjaldfreist til 20. í mánaðinum. Verður tøkugjaldið ikki goldið*" broytt til: "*...við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Verður gjaldið ikki goldið...".*

Inntøkur til kommunurnar
Í § 1, nr. 2, § 2 b, stk. 1 verður skotið upp, at upp til 2% av inntøkunum frá gjaldinum falla til kommunurnar.

Í § 1, nr. 2, § 2 b, stk. 2, verður skotið upp, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum í kunngerð ásetur, hvussu peningurin frá gjaldinum verður býttur millum kommunurnar og um útgjald. § 2 b verður sett í gildi frá 1. januar 2024.

Harumframt er ætlanin, at 1% av inntøkunum frá tøkugjaldinum fara til at raðfesta gransking innan laksaaling. Áhaldandi gransking innan økið er ein týðandi liður í at tryggja lívfrøðiliga burðardygd í vinnuni.

Í § 1, nr. 3 verða skjølini 1 og 2, sbr. skjal 1, sett sum skjøl í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Lógarbroytingin ger, at alifyritøkur skulu gjalda lutfalsliga hægri tøkugjald, tá laksaprísurin er høgur, og samstundis gjalda minni, tá prísurin er lágur. Avgjaldsgrundarlagið er tann nøgdin, alifelagið hevur slaktað ein ávísan mánað, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum sama mánað. Tøkugjaldið verður funnið við, at avgjaldsgrundarlagið verður faldað við viðkomandi prosentsatsi, ið er stigvíst hækkandi, alt eftir hvør miðal altjóða marknaðarprísurin er. Sambært nýggju ásetingunum í lógini, verða gjøldini frameftir hesi, tá P er miðal altjóða marknaðarprísur í DKK pr. kg., og K er miðal framleiðslukostnaðurin í DKK pr. kg.

- Er P minni enn K, er gjaldið 0,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K, men minni enn K pluss 5 kr., er gjaldið 2,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men minni enn K pluss 15 kr., er gjaldið 5,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr., men minni enn K pluss 20 kr., er gjaldið 7,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 20 kr., men minni enn K pluss 25 kr., er gjaldið 10,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 25 kr., men minni enn K pluss 30 kr., er gjaldið 12,5%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 30 kr., men minni enn K pluss 35 kr., er gjaldið 15,0%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 35 kr., men minni enn K pluss 40 kr., er gjaldið 17,5%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 40 kr., er gjaldið 20,0%.

Hildið verður fast í grundregluni um at krevja eitt nýtslugjald fyri framíhjárættindi at gagnnýta føroysku aliøkini. Nýtslugjald verður kravt, óansæð hvussu laksaprísurin háttar sær. Er laksaprísurin lægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 0,5%.

Endamálið við stigvísa gjaldinum í mun til altjóða marknaðarprísin er, at størri partur av serstaka vinninginum fellur til landið, tá laksaprísirnir eru lutfalsliga høgir. Stigini verða ásett við støði í meting av miðal framleiðslukostnaðinum hjá alifyritøkunum.

Mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært “Fish Pool Index” verður framvegis brúktur sum altjóða marknaðarprísur at rokna avgjaldsgrundarlagið undir loyvisgjaldinum. Umroknað verður framvegis til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank.

Sambært uppskotinum falla 2% av inntøkunum frá gjaldinum til kommunurnar.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uttanríkis- og vinnumálaráðið sendi tann 8. mars 2023 uppskotið út til hoyringar hjá myndugleikum og feløgum. Hoyringsfreistin varð sett til 16. mars 2023, men varð eftir áheitan frá hoyringspørtunum longd til 19. mars 2023.

Hesir myndugleikar og feløg fingu uppskotið til hoyringar:
Havbúnaðarfelagið, Landsbankin, Kommunufelagið, Fíggjarmálaráðið og Granskingarráðið.
Hesir hava latið Uttanríkis- vinnumálaráðnum viðmerkingar til uppskotið:

- Kommunufelagið
- Landsbankin og
- Havbúnaðarfelagið

Kommunufelagið
Í hoyringarsvarinum frá Kommunufelagnum verður víst á, at ætlaðu broytingarnar í uppskotinum hava beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Eisini verður fegnast um, at nýggja landsstýrið ætlar at lata kommununum ein part av tøkugjaldinum. Mælt verður tó til at gera eina greiðari og einfaldari loysn, har bæði uppskotini, broytingarnar í tøkugjaldinum og veiðigjøldunum verða broytt soleiðis, at kommunurnar altíð verða fíggjarliga skaðaleysar av veiðigjøldunum.

Landsbankin
Yvirskipað tekur Landsbankin undir við ætlaðu broytingunum samstundis, sum víst verður á, at vitan um støddina á tilfeingisrentuni er avgerandi fyri metingina av, hvat tøkugjaldið eigur at vera.

Landssbankin hevur sæð útrokningarháttin hjá landsstýrinum og setur ikki spurning við háttin.

Harumframt kemur Landsbankin í hoyringarsvarinum við fleiri tilmælum um átøk, ið eiga at verða gjørd. Víst verður til fylgiskjal 5, hoyringarnotat.

Havbúnaðarfelagið
Yvirskipað mælir felagið í hoyringarsvarinum frá, at lógin verður broytt samsvarandi verandi broytingaruppskoti.

Í hoyringarsvarinum eru fleiri tættir, men høvuðsboðskapirnir eru viðvíkjandi:

- Altjóða marknaðarprísinum
- Meirvirkaðum vørum
- Forwardprísi
- Framleiðslukostnaði

- Nýggja tøkugjaldsstiganum
- Tíðarætlanini
- Týdninginum av eini breiðari semju
- Búskapargrunni
- Gransking
- Einari skattliga grundaðari skipan

Víst verður til fylgiskjal 5, hoyringarnotat.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Talva 1: Tøkugjald fyri árini 2018-2022

Tøkugjald	2018	2019	2020	2021	2022
Verandi skipan	136.361.000	139.996.000	81.813.000	196.157.000	284.213.957

Í talvu 1 sæst, hvussu nógv landið hevur fingið inn í tøkugjaldi árini 2018-2022 eftir verandi skipan. Í 2021 vóru prísirnir lutfalsliga lágir, men hóast hetta fekk landið 196 mió. kr. inn í tøkugjaldi. Hevði nýggja skipanin verið galdandi í 2021, hevði landið fingið umleið 61 mió. kr. minni inn í tøkugjaldi. Orsøkin til hetta er, at framleiðslukostnaðurin er hækkaður munandi síðani tøkugjaldið seinast, í 2018, varð stillað, og at marknaðarprísurin í fleiri vikur í 2021 lá undir framleiðslukostnaðinum. Í hesum tíðarskeiðinum rindaði alivinnan tøkugjald, hóast raksturin gav undirskot. Hinvegin, um broytti stigin var galdandi í 2022, har laksaprísirnir hava verið sera høgir, so hevði landskassin fingið umleið 296 mió.kr. eyka inn í tøkugjaldi í 2022.

Talva 2: Mett tøkugjald fyri árini 2020-2024

Tøkugjald í kr.	2020	2021	2022	2023M	2024M
Verandi skipan	81.813.000	196.157.000	284.213.957	276.714.484	278.062.181
Nýggja uppskotið*	67.408.090	134.793.034	549.594.432	489.651.755	412.646.067
Munur	-14.404.910	-61.363.966	265.380.475	212.937.271	134.583.886

**Viðmerkjast skal, at framleiðslukostnaðurin, ið er nýttur í sambandi við útrokningarnar, er roknaður við støði í roknskapartølum fyri roknskaparárið 2021.*

Sum áður nevnt tryggjar nýggja skipanin, at alifyritøkur skulu gjalda lutfalsliga hægri tøkugjald, tá laksaprísurin er høgur, og samstundis gjalda minni, í tíðarskeiðum við lægri prísi. Í talvu 2 sæst, hvussu nógv landið væntar í meirinntøku av nýggju skipanini árini 2023 og 2024. Metingin omanfyri tekur støði í prísum á Fish Pool. Fyri 2022 eru spotprísir nýttir, meðan forwardprísir eru nýttir til metingarnar fyri 2023 og 2024. Samlaða tøkan 2022 var á leið 6% lægri enn í 2021, meðan tøkan í 2023 og 2024 verður mett at hækka 5 % hvørt árið.

Avleiðing fyri tøkugjaldið
Eftir verandi skipan hevði landið fingið 276,7 mió. kr. í tøkugjaldi í 2023. Eftir nýggju skipanini fær landið 489,7 mió. kr. í tøkugjaldi í 2023. Metingin er sostatt, at landskassin hevði fingið 212,9 mió. kr. í øktari inntøku sum avleiðing av lógaruppskotinum, um skipanin hevði havt gildið alt 2023. Treytað av, at inntøkurnar falla javnt, og at gildiskoman verður 1. august 2023, verður talan um á leið 88,7 mió. kr.

Avleiðing fyri partafelagsskattin
Tøkugjaldið kann sambært skattalógini § 33, nr. 18 dragast frá skattskyldugu inntøkuni. Økta tøkugjaldið ger, at úrslitini hjá alifyritøkunum minka, og harvið rinda hesi minni í partafelagsskatti. Partafelagsskatturin er í løtuni 18%.

Kommunurnar fáa 30% av partafelagsskattinum og landið fær 70%, so hetta ávirkar eisini kommunurnar. Taka vit t.d. árið 2023, har metta meirinntøkan, sum avleiðing av nýggju skipanini, er 212,9 mió. kr., so minkar partafelagsskatturin við umleið 38,3 mió. kr. Netto eru

sostatt umleið 174,6 mió. kr. eftir til almennu kassarnar. Partafelagsskatturin verður tó inngoldin árið eftir, at ársúrslitið fyriliggur, í hesum førinum í 2024.

Skotið verður upp, at gildiskoman verður 1. august 2023 og harvið eru fíggjarligu avleiðingarnar fyri skattaárið 2023 5/12 av áðurnevndu upphæddum treytað av, at inntøkurnar frá gjaldinum falla javnt gjøgnum árið.

Avleiðing fyri skatt á vinningsbýti
Eitt økt tøkugjald merkir, alt annað líka, at minni verður at luta út til partaeigararnar, og tí minkar skatturin av vinningsbýti eisini. Í miðal fær landið 7,4% av rakstrarúrslitinum inn í vinningsbýtisskatti. Hetta merkir, at um vit økja rakstrarkostnaðin hjá alivinnuni við einum øktum tøkugjaldi, so missa vit 7,4% av hesi øktu inntøkuni sum ein lækkaðan vinningsbýtisskatt. Hetta svarar til á leið 15,8 mió. kr. fyri alt 2023 og 6,6 mió. kr. fyri 5 mánaðir, treytað av at inntøkurnar frá gjaldinum falla javnt gjøgnum árið.

Samlaða avleiðingin fyri almennu kassarnar
Um roknað verður við at fáa 212,9 mió. kr. eyka í tøkugjaldi í í 2023, so missa landið og kommunurnar umleið 38,3 mió. kr. í partafelagsskatti og 15,8 mió. kr. í vinningsbýtisskatti. Økta nettoinntøkan fyri alt 2023 til almennu kassarnar hevði sostatt verið 158,9 mió. kr., um uppskotið varð sett í gildi pr. 1. januar 2023. Verður gildiskoman sett til 1. august 2023, verður samlaða nettoinntøkan í 2023 66,2 mió. kr. treytað av, at inntøkurnar falla javnt gjøgnum árið.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Føroysku alifyritøkurnar verða ávirkaðar av uppskotinum. Fyri alivinnuna hevur uppskotið við sær, at tøkugjaldið í 2023 væntandi økir um útreiðslurnar hjá føroysku alifyritøkunum við umleið 88,7 mió. kr. treytað av, at gildiskoman verður 1. august, og treytað av, at gjaldið verður javnt gjøgnum árið. Økti rakstrarkostnaðurin merkir, at alifyritøkurnar, alt annað líka, rinda lutfalsliga minni í partafelagsskatti og rinda lutfalsliga minni út í vinningsbýti.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar við tað, at hægri tøkugjald merkir, at kommunurnar missa part av partafelagsskattinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið sampakkar við millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri uppskotið.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið elvir ikki til markaforðinar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, panting og sektir og ger ikki onnur størri inntriv í rættindini hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Tað eru ikki ásetingar um skattir og avgjøld í uppskotinum, sbr. pkt. 2.12 niðanfyri.

2.12. Gjøld
Loyvisgjaldið á alivinnuna er ikki at meta sum ein skattur, men heldur sum eitt nýtslugjald, sum landsmyndugleikarnir áleggja fyri framíhjárættin at gagnnýta føroysku alifirðirnar.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Í § 2, stk. 4 í uppskotinum verður skotið upp, at heimild verður løgd til landsstýrismannin til við kunngerð at áseta tey roknskapartøl, sum alifyritøkurnar skulu lata inn, so framleiðslukostnaðurin fyri hvønn ársfjórðing kann gerast upp.

Í § 2 b, stk. 2 í uppskotinum verður skotið upp, at heimild verður løgd til landsstýrismannin í fíggjarmálum til við kunngerð at áseta, hvussu inntøkurnar frá gjaldinum verða býttar millum kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í sambandi við broytingaruppskotið er § 2 í galdandi lóg býtt sundur í 2 greinar, § 2 og § 2 a og nýgg § 2 b er sett inn.

Nr. 1
Avgjaldsgrundarlagið verður framvegis roknað sum tann nøgdin, alifelagið hevur slaktað í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum sama mánað. Hetta er eins og í galdandi lóg. Mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært Fish Pool Index verður framvegis brúktur sum altjóða marknaðarprísur at rokna avgjaldsgrundarlagið undir loyvisgjaldinum. Hetta er sama skipan sum eftir galdandi lóg.

Miðal framleiðslukostnaðurin fyri kilo verður útroknaður hálvárliga. Hetta verður gjørt við støði í roknskapunum hjá alifyritøkunum.

Uppgerðin av miðal framleiðslukostnaðinum fyri fyrra hálvár verður gjørd við støði í hálvársroknskapunum hjá alifyritøkunum fyri fyrra hálvár árið fyri. Uppgerðin av miðal framleiðslukostnaðinum fyri seinna hálvár verður gjørd við støði í ársroknskapunum hjá alifyritøkunum árið fyri.

Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð tey roknskapartøl, sum alifyritøkurnar skulu lata inn, so framleiðslukostnaðurin hálvárliga kann gerast upp. Miðal framleiðslukostnaðurin fyri hálvárið verður almannakunngjørdur á heimasíðu Uttanríkis- og vinnumálaráðsins.

Hátturin, ið verður nýttur til at finna miðal framleiðslukostnaðin, er hesin:

Framleiðslukostnaður =
+ Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar
+ Goymslubroytingar
+ aðrir uttanhýsis kostnaðir
+ starvsfólkakostnaðir
+ av- og niðurskrivingarkostnaðir
÷ tøkugjaldið til landskassan.

Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar: Kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar eru sum oftast uppgivnir í rakstrarroknskapinum sum ein serstakur postur. Tó upplýsa summar fyritøkur einans aðrar uttanhýsis kostnaðir í einum bruttoposti, har kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar eru innroknaðir. Í slíkum føri eru tað einans aðrir uttanhýsis kostnaðir, sum verða nýttir í útrokningini.

Goymslubroytingar: Her er talan um goymslubroytingar av lidnum vørum og vørum í gerð. Virðið á goymslubroytingunum er tað í rakstrarroknskapinum uppgivna virðið.

Aðrir uttanhýsis kostnaðir: Aðrir uttanhýsis kostnaðir eru uppgivnir í rakstrarroknskapinum. Summar fyritøkur uppgeva aðrar uttanhýsis kostnaðir í einum bruttoposti, sum eisini umfata kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar. Aðrar fyritøkur skilja ímillum aðrar uttanhýsis kostnaðir

og kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar. Fyri útrokningina er tað umráðandi, at bæði aðrir uttanhýsis kostnaðir og kostnaðir til rávørur og hjálpartilfar verða tiknir við.

Starvsfólkakostnaðir: Starvsfólkakostnaðir eru teir, ið eru uppgivnir í rakstrarroknskapinum.

Av- og niðurskrivingar: Tað eru av- og niðurskrivingarnar í rakstrarroknskapinum, sum skulu nýtast.

Tøkugjaldið til landskassan: Hjá alifyritøkunum er tøkugjaldið ein kostnaður, sum verður skrásettur í rakstrarroknskapinum, undir *Aðrir uttanhýsis kostnaðir*. Tøkugjaldið er ikki at meta sum ein framleiðslukostnaður og verður tí trekt frá í útrokningini.

Framleiðslukostnaðurin fyri kilo er samlaði framleiðslukostnaðurin/tøkan í kruvdari vekt.

Hetta roknistykkið verður gjørt fyri alipartin hjá alifyritøkunum í Føroyum. Uppgerðin verður gjørd við støði í hálvárs- og ársroknskapunum hjá føroysku alifyritøkunum.

Uppskotið broytir lógina soleiðis, at alifyritøkurnar skulu gjalda lutfalsliga meira, tá laksaprísirnir eru høgir.

Avgjaldsgrundarlagið er tann nøgdin í kruvdari vekt, alifelagið hevur slaktað ein ávísan mánað, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum sama mánað. Tøkugjaldið verður funnið við, at avgjaldsgrundarlagið verður faldað við viðkomandi prosentsatsi, ið er stigvíst hækkandi, alt eftir hvør miðal altjóða marknaðarprísurin er.

Nr. 2
Fyri greidleikans skyld verður skotið upp, at gjaldið verður ásett í nýggjari § 2 a. Samstundis verður skotið upp, at galdandi § 2, stk. 5-7, gerast partur av nýggju § 2 a.

Skotið verður upp at tillaga verandi skipan soleiðis, at nøkur stig verða løgd inn afturat og prosentsatsirnir broyttir.
Heldur enn at hava tøkugjaldsstigan inni í sjálvari greinini, sum í verandi løgtingslóg, verður skotið upp at tøkugjaldið verður ásett sum ásett í skjali 2.
Gamla skipanin – galdandi lóg
- Er prísurin 36 kr. kilo ella hægri, er gjaldið 5%.
- Er prísurin millum 32 kr. og 36 kr. kilo, er gjaldið 2,5%.
- Er prísurin lægri enn 32 kr. kilo, er gjaldið 0,5%.

Nýggja skipanin - lógaruppskotið
P er miðal altjóða marknaðarprísurin í DKK pr. kg., og K er miðal framleiðslukostnaðurin í DKK pr. kg.

- Er P minni enn K, er gjaldið 0,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K, men minni enn K pluss 5 kr., er gjaldið 2,5%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 5 kr., men minni enn K pluss 15 kr., er gjaldið 5,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 15 kr., men minni enn K pluss 20 kr., er gjaldið 7,5%.

- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 20 kr., men minni enn K pluss 25 kr., er gjaldið 10,0%.
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 25 kr., men minni enn K pluss 30 kr., er gjaldið 12,5%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 30 kr., men minni enn K pluss 35 kr., er gjaldið 15,0%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 35 kr., men minni enn K pluss 40 kr., er gjaldið 17,5%
- Er P hægri enn ella hin sami sum K pluss 40 kr., er gjaldið 20,0%.

Talvan niðanfyri er dømi, ið vísir gjaldið treytað av altjóða marknaðarprísinum, tá miðal framleiðslukostnaðurin, K, er 39,15 kr.

Prísur		**Gjald**
P<K	**P** < 39,15 kr.	0,5%
K ≤ P < K+5	39,15 kr. ≤ **P** < 44,15 kr.	2,5%
K+5 ≤ P < K+15	44,15 kr. ≤ **P** < 54,15 kr.	5,0%
K+15 ≤ P < K+20	54,15 kr. ≤ **P** < 59,15 kr.	7,5%
K+20 ≤ P < K+25	59,15 kr. ≤ **P** < 64,15 kr.	10,0%
K+25 ≤ P < K+30	64,15 kr. ≤ **P** < 69,15 kr.	12,5%
K+30 ≤ P < K+35	69,15 kr. ≤ **P** < 74,15 kr.	15,0%
K+35 ≤ P < K+40	74,15 kr. ≤ **P** < 79,15 kr.	17,5%
P≥K+40	**P** ≥ 79,15 kr.	20,0%

Í § 2, stk. 7, í løgtingslógini um loyvisgjald á alivinnu er ásett, at tøkugjaldið fellur til gjaldingar í fýra gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. oktober við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum.

Endamálið við hesum partinum av lógaruppskotinum er at rætta ein gamlan feil. Longu tá lógin varð samtykt á fyrsta sinni, var ætlanin, at gjaldingin av tøkugjaldinum skuldi gerast pr. ársfjórðing eins og við meirvirðisgjaldinum, t.e. at fjórða gjaldið skuldi fella til gjaldingar 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Sostatt er talan um eina tekniska rætting viðvíkjandi rindanini av tøkugjaldinum.

Í § 1, nr. 2, stk. 4, í broytingaruppskotinum verður skotið upp, at fjórða árliga gjaldið skal fella til gjaldingar 1. november heldur enn 1. oktober. TAKS og alivinnan virka longu nú sum um gjaldfreistin er 1. november.

Í § 1, nr. 2, verður skotið upp at seta inn nýggja § 2 b. Við § 2 b, verður skotið upp, at 2% av inntøkunum frá gjaldinum falla til kommunurnar. Sambært uppskotinum ásetur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum nærri reglur um, hvussu peningurin frá gjaldinum verður býttur millum kommunurnar. Býtið verður ásett við støði í eini útrokning av lækkingini í inntøkuni frá partafelagsskatti í teimum kommunum, sum fáa lægri partafelagsskatt vegna broyting í tøkugjaldinum við hesum lógaruppskoti. Meginreglurnar í kap. 4 og 5 í skattalógini um tilhalds- og atvinnukommunur verða nýttar sum ein treyt í býtinum.

Harumframt er ætlanin, at 1% av inntøkunum frá tøkugjaldinum fer til at raðfesta gransking til frama fyri aling í Føroyum. Endamálið er at stuðla upp undir granskingarvirksemið á aliøkinum í breiðari merking. Tað kundi t.d. verið ávirkan frá aling á havumhvørvi, laksalús ella aling til havs o.s.fr. Hugsanin er, at granskingarráðið umsitur peningin, og tekur støðu til, hvørjar granskingarverkætlanir kunnu fáa stuðul. Sambært § 11 í løgtingslóg um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan, kunnu allar stuðulsskipanir, sum hava til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til gransking, menning og nýskapan, verða lagdar til fyrisitingina, smbr. § 15 í løgtingslógini.

Granskingarráðið heldur peningin, ið er tilskilaður frá tøkugjaldinum, atskildan frá øðrum játtanum.

Nr. 3
§ 1, nr. 3 setur skjølini 1 og 2 inn í løgtingslógina. Skjal 1 lýsir háttin, ið verður nýttur til at finna miðal framleiðslukostnaðin. Skjal 2 vísir tøkugjaldsstigan, ið vísir, hvussu gjaldið er treytað av marknaðarprísinum.

Til § 2
Eftir uppskotinum skal lógin fáa gildi 1. august 2023. §2 b, verður tó sett í gildi 1. januar 2024.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 28. mars 2023

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Landsbanka Føroya
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Havbúnaðarfelagnum
Fylgiskjal 5: Hoyringsnotat frá UVMR